# ítróttur

Nr. 169 • týsdagur • 9. september 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo


# Útlendsku sjónvarpsrásirnar bjargaðu leygardegnum




*Sambært frásøgumonnunum hjá Sky Sport høvdu føroysku áskoðararnir nógv at fegnast um fyri steðgin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri, biðjur hyggjararnar orsaka um vánaligu tænastuna, sum SvF borðreiddi við, tá ið fótbóltshugaðu føroyingarnir leygardagin noyddust at bíða meiri enn teir hugdu**

SJÓNVARPIÐ OG LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen og Jákup Mørk*

Tað er einki nýtt, men tað er eins upproytandi hvørja ferð. Sjónvarp Føroya megnaði leygardagin ikki at liva upp til tað, sum teir høvdu givið lyfti um. Tað kiksaði at fáa signalið til Føroya. Hjá teimum, sum høvdu møguleika fyri tí, var lag á manni at fylgja landsdystinum á Viasat ella Sky sport. Hjá teimum, sum bara høvdu møguleika at síggja SvF, var neyðugt at bíða inntil tíggju minuttir vóru farnir av sjálvum dystinum. So var vánalig mynd at síggja, og síðani varð dysturin vístur í brotum, og bæði ljós– og myndagóðskan vóru vánalig.

Hetta er ikki fyrsta ferðin, at tað hevur kiksað á útivølli, og hetta var onnur ferðin upp í slag, at tað ikki bar til at fylgja við frá fyrsta bríksli. Soleiðis var tað eisini, tá ið Føroyar í juni spældu í Íslandi.

## Allur pakkin

Tá ið landsdystur er á skránni verður roknað við, at tað í sjónvarpinum er møguleiki fyri at síggja alt tað, sum gongur fyri seg. Í hvussu so er á sjónvarpsrásunum, sum eru í londunum, ið eru partar av dystinum. Tað vil siga, at eitt sindur av upphitingini er at síggja, og at tað ber til at fylgja við, tá ið spælararnir standa klárir at ganga inn á vøllin, tá ið tjóðsangirnir verða sungnir og so inntil dysturin væl og virðiliga er liðugur. Hetta megnaði Sjónvarp Føroya á ongan hátt. Einasta sjónvarpið í heiminum, sum sendur gomul videoløg í steðginum í landsdystum, er Sjónvarp Føroya. Fyri fótbóltshugað tykist hetta fullkomuliga burturvið.

Í Sky sport, sum sjálvandi er ein nógv størri sjónvarpsstøð enn tann føroyska, megnaðu teir alt tað, sum roknast skal við í sovornum førum. Undan dystinum sendu teir eitt nú sera áhugaverda samrøðu við Jákup Mikkelsen, og í steðginum og eftir dystarenda vóru tað gomlu og kendu fótbóltsspælararnir, Charlie Nicolas, sum var álopsspælari í Celtic og Arsenal, og Gordon Mc Queen, sum var miðverji í eitt nú Manchester United, ið gjørdu viðmerkingar.

Í steðginum helt Charlie Nicolas, at føroyska liðið hevði sýnt fótbóltsspæl, sum í minsta lagið var á hædd við tað, sum Skotland hevði víst. Eftir dystarenda vóru teir báðir nøgdir við úrslitið, men teir hildu lítið um leikliga avrikið hjá Skotlandi.

Viasat sport var við frá tí at farið varð undir tjóðsangirnar og inntil dysturin væl og virðiliga var liðugur. Viðmerkjararnir vóru positivir yvirfyri føroyska liðnum, sum teir mettu hevði sýnt fótbóltsspæl, sum væl og virðiliga var á hædd við tað, sum tað kundi roknast við av Føroyum.

## Kiksaða SvF

Mánadagin fingu vit orðið á sjónvarpsstjóran, Mikkjal Helmsdal, og hann ásannaði alt fyri eitt, at hetta var ótrúliga keðiligt fyri Sjónvarpið.

- Tað stutta av tí langa er, at vit høvdu tekniskar trupulleikar. Signalið frá fylgisveininum, haðani vit skuldu taka myndirnar, var ov veikt, og tað bar ikki til at rætta hetta, meðan sent varð frá dystinum.

Spurdur, hvørt slíkt ikki er nakað, sum eigur at verða kannað frammanundan, soleiðis at sleppast kann undan mistakinum, sigur Mikkjal Helmsdal, at tað eru tey í løtuni í ferð við at kanna.

- Í løtuni fái eg ikki gjørt tær stóru viðmerkingarnar til hetta. Vit eru farin at kanna, hvussu hetta ber til, og ikki minst hvussu vit sleppa undan hesum framyvir. Tað einasta eg annars fái sagt í løtuni er, at vit eru sera hørm um mistakið, og at vit geva hyggjarunum eina treytaleysa umbering fyri vánaligu tænastuna, sum teir fingu leygardagin, segði Mikkjal Helmsdal at enda.

Sjónvarpið hevur annars sent út tíðindaskriv hesum viðvíkjandi, og framgongur hetta aðrastaðni í blaðnum.





# Akkurát sum ætlað

**Julian Johnsson var fegin um málið, sum var beinleiðis úrslit av venjingunum, men hann ásannaði, at føroysku leikararnir komu at renna ov nógv leygardagin**



*So skjótt sum málið var veruleiki, tustu føroysku leikararnir oman í hornið fyri føroysku áskoðarunum*

LEIKARAPRÁT
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**Glasgow:** Fyri føroyingar var einki at ivast í, hvat hæddarpunktið í dystinum leygardagin var. Stútarin hjá Julian Johnsson sendi eina løtu Skotland í sjokkstøðu, og tó at teir seinni vunnu á hesum, so man tað vera løtan, sum stendur eftir fyri okkara viðkomandi.

Tá vit hittu Julian Johnsson á orðið um sjálvt málið, var hann skjótur at staðfesta, at talan var um eina støðu, sum liðið hevur roynt at vant.

- Vit hava roynt at fingið ein mann inn at órógva málverjan, og so skal Jákup smekka hornasparkið aftur til nærmaru stong. Tað riggaði eisini perfekt, og hjá mær var so bara at seta høvdið undir. Kanska átti málverjin hjá teimum sín part, men tað riggaði akkurát so, sum vit høvdu avrátt, sigur Julian, sum eisini leyp beina leið yvir móti Jákupi á Borg, tá bólturin hevði siglt í meskarnar.

## Runnu ov nógv

Um sjálvan dystin helt Julian annars, at føroyska liðið kom at renna alt ov nógv uttan bólt.

- Keturnar hjá okkum hingu ikki nóg væl saman, og tí gjørdust rennibanarnir til tíðir dekan ov langir. Samstundis hevði hetta ta ávirkan, at vit ikki fingu okkara spæl at koyra, og tí vóru mest sum eingir steðgir. Megnar tú at halda bóltinum koyrandi, so fært tú eisini hinar at renna, men hesa ferð var tað næstan bara hinvegin.

- Tí haldi eg eisini, at vit vóru um at gerast dekan ov moyrir í seinna hálvleiki. Tað kostar nógv, tá spælið hjá okkum ikki koyrir, men hinvegin skal eingin leikari lastast fyri tað. Innsatsurin hjá hvørjum einstøkum var heilt í topp, og so mugu vit bara vóna, at vit fáa spælið at koyra betri næstu ferð.

# Fegin um stigini

**Týski landsliðsvenjarin helt, at skotski sigurin var uppiborin, men hann ivaðist ikki í, at Føroyar kunnu geva øllum mótstøðuliðum ein skarpan gang**

VENJARIN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ein ógvuliga avkláraður berti Vogts, sum eftir landsdystin leygardagin steig inn í pressurúmið á Hampden Park, har tíðindafundurin var á skránni.

Um dystin sjálvan helt hann fyri, at hann var ein glaður maður, tí stigini komu til høldar.

- Tað hevði alt at siga, tí um vit ikki fingu hesi, so var eingin nytta hjá okkum at fara til Dortmund at spæla. Vit skuldu hava trý stig, og tað var tað.

- Men annars eri eg sum heild nøgdur við dystin. Eina løtu detta vit ov langt aftur á vøllin, soleiðis at føroyska liðið fær pláss at spæla á, og tað var millum annað tað, sum kostaði útjavninga. Tíbetur fáa Barrry Ferguson og Colin Cameron togað liðið niðanaftur, soleiðis at vit aftur fáa tak á, og tá vit so skora til 2-1, gevur tað okkum endaliga yvirtakið.

Síðani varð nógv gjørt burturúr, hvussu teir einstøku leikararnir høvdu staðiðs seg, og hvussu Vogts var nøgdur um hesar, men tá so spurt varð um, hvat hann helt um føroyska liðið, hevði Berti bert rósur at bera.

- Tit hava eitt gott lið, og eg vóni, at tit kunnu hjálpa okkum við at vinna á Litava mikudagin. Eisini í dag skaptu tit nakrar møguleikar, og so leingi tað verður gjørt, so hava tit ein møguleika at vinna, segði Vogts at enda, áðrenn hann ynskti føroyska liðnum góða eydnu við seinastu royndini.




Visiónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Í Sparikassanum starvast 181 fólk á 21 deildum kring um í landinum. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru trygdleiki og brúkaravinsemi. Á starvsfólkadeildini, Yviri við Strond 2, starvast 3 fólk.

## Starvsfólkaleiðari við hugsjónum

Vit sóknast eftir nýggjum starvsfólkaleiðara, tí dugnaligi starvfólkaleiðari okkara hevur tikið við nýggjum avbjóðingum.

Nýggi starvsfólkaleiðarin gerst partur av einari fyritøku við visiónum og málum á starvsfólkaøkinum. Bæði starvsfólk og leiðarar hava seinastu árini verið í einari víðfevndari menningartilgongd.

Virkni starvsfólkapolitikkurin hevur stóran týdning soleiðis, at Sparikassin framhaldandi varðveitir og dregur dugnalig starvsfólk til sín. Starvsfólkini skulu støðugt mennast, so Sparikassin eisini í framtíðini megnar at veita kundunum framúr góða fakliga og persónliga ráðgeving.

Trivnaður og arbeiðsgleði millum starvsfólkini hevur eisini avgerandi týdning fyri Sparikassan, og á hesum økjum skal starvsfólkaleiðarin vera virkin.

Fyri at røkka hesum málum krevst ein góður og sjálvstøðugur starvsfólkaleiðari við menniskjakunnleika og áhuga fyri starvsfólkaviðurskiftum, og sum dugir væl at fáast við fólk. Innlit í Human Ressource Management – gagnnýtslu av starvsfólkaførleikum – er gott grundstøði.

Evnini at samstarva, samskifta og lurta mugu vera góð. Vit ynskja okkum eina eldsál, ið eggjar øðrum til og torir at ganga á odda. Stundum krevst eisini av starvsfólkaleiðaranum, at hann loysir ósemjur, og til tess krevst dirvi, innlit og oftani eisini humor.

Starvsfólkaleiðarin er sparringspartnari hjá stjórnini, deildarleiðarum og starvsfólkum í Føroya Sparikassa, og hann vísir beinleiðis til stjórnina.

Nakrar fyrisitingarligar uppgávur liggja eisini hjá starvsfólkaleiðaranum, m.a. setan og útbúgving av starvsfólkum, lønarútgjalding og frítíðaruppgerðir. Á Starvsfólkadeildini starvast trý fólk, leiðarin íroknaður.

Starvið verður lønt sambært avtalu.

Áhugað eru vælkomin at venda sær til Bjarna Olsen, stjóra, á telefon 348575 ella á teldupostí bjarni.olsen@sparikassin.fo.

Umsóknir skulu vera Sparikassanum í hendi í seinasta lagi týsdagin tann 16. september 2003. Tær skulu stílast til:

FØROYA SPARIKASSI
Att.: Bjarni Olsen, stjóri
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo